

# Dugir tú væl at skriva?

## Spennandi samskiftisstarv á Løgmansskrivstovuni leyst at søkja

Dugir tú væl at skriva og at fáa ein boðskap greitt út? Kanst tú seta fangandi orð á eitt stórt og torført politiskt mál eins væl og eina lítla runda føðingardagsheilsan? Trívist tú mitt í politiska maskinrúminum, har ferðin mangan er høg? So ert tað møguliga tær, vit leita eftir.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi samskiftisstarv, har ein av tínum fremstu uppgávum verður at skriva.

Tú fært m.a. ábyrgdina av, í tøttum samstarvi við løgmanni, at umseta hugskot og hugsjónir hjá løgmanni til røður og tíðindaskriv. Tað verið seg alt frá teimum stóru røðunum, sum nýggjársrøðu og ólavsøkurøðu, til smærri røður, tá løgmaður ber fram heilsur, setur tiltøk og ráðstevnur.

Tú kemur eisini at taka tær av innan- og uttanhýsis samskiftinum hjá Løgmansskrivstovuni, undir hesum røkt av heimasíðu, innanneti og sosialum miðlum. Tú verður harafturat bindilið millum Løgmansskrivstovuna, stjórnarráðini og uttanhýsis veitarar, tá ið tað snýr seg um yvirskipaða samskiftið hjá Landsfyrisitinginí.

Møguleiki verður eisini fyri at luttaka í øðrum uppgávum hjá Løgmansskrivstovuni, eitt nú í mun til tvørgangandi verkætlanir, ið fevna um ábyrgdarøki hjá fleiri landsstýrisfólkum.

**Faklig førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving innan t.d. samskifti, journalistik ella samfelagsviðurskifti. Harumframt ímynda vit okkum, at tú hevur royndir innan økið.

**Persónlig førleikakrøv**
Vit vænta, at tú sum søkir:

- dugir sera væl at samskifta á føroyskum og enskum, bæði í skrift og talu
- hevur áhuga og innlit í politikk og samfelagsviðurskifti
- dugir skjótt og sjálvstøðugt at finna fram viðkomandi tilfar og seta teg inn í nýggj viðurskifti
- ert ágrýtin, fleksibul og trívist við at arbeiða undir trýsti og við stuttum freistum

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya ella avvarðandi fakfelag.

Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna, hini stjórnarráðini og stovnar undir stjórnarráðunum. Tænastustaðurin er í løtuni Løgmansskrivstovan.

**Umsókn**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsrensli og øðrum skulu sendast við telduposti til: **starv@tinganes.fo**

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **10. november 2024.**

Starvið verður sett 1. januar 2025 ella eftir nærri avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Møguligir umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Pól R. Wolles, deildarstjóra, teldupostur: **polrw@tinganes.fo,** telefon: **504705**, at fáa nærri upplýsingar um starvið.